

# NÁTTÚRAN OG NÆRLEIKIN HUGTAKA FERÐAFÓLK MEST

**FØROYSKA** NÁTTÚRAN **RÚNARBINDUR** ALTÍÐ ÚTLENDSK **FERÐAFÓLK**, OG TEY ERU EISINI **HUGTIKIN** AV, AT ALDARGOMUL SØGA **FRAMVEGIS** ER LIVANDI Í FØROYUM, SAMSTUNDIS SUM **INTERNETSAMBAND** ER Á HVØRJUM TANGA, SIGUR **SÚSANNA SØRENSEN**, STJÓRI Á **FERÐAVINNUDEILDINI** HJÁ UTTANRÍKISRÁÐNUM. SKJÓTT ER AT UPPLIVA **NÓGV** YMISKT Í FØROYUM, OG TAÐ HUGTEKUR EISINI **FERÐAFÓLKINI**



**FERÐAVINNA**
Uni Arge
uniarge@gmail.com

Føroyar eiga at verða marknaðarførdar sum ein frískligur skandinaviskur gimsteinur, ið ikki er uppdagaður enn, segði bretski ráðgevin, Simon Anholt, í frágreiðing síni um kappingarsamleika Føroya í fjør.

Niðurstøða hansara var, at Føroyar við síni náttúru, søgu og mentan eru ógvuliga sermerktar sum ferðamál, men trupulleikin er, at fá fólk í heiminum vita, at Føroyar yvirhøvur finnast.

Talið á útlendskum ferðafólkum í Føroyum í 1993 var umleið 25.000, og í 2000 vísti ein kanning, at talið var komið upp á 40.000. Í 2006 varð ferðafólkatalið mett at vera 47.000, men seinastu tvey árini er talið minkað 12-15 prosent.

Samanumtikið ber tó til at staðfesta, at ferðavinnan seinastu 15-20 árini hevur tikið seg fram, og á ferðavinnudeildini hjá Uttanríkisráðnum hevur stjórin, Súsanna Sørensen, góðar vónir um, at vinnan fer at menna seg uppaftur meira.

– Eg vænti, at ferðafólkatalið í Føroyum fer at vaksa. Vit skulu ikki vænta nakran brádligan vøkstur, men eru vit áhaldandi og miðvís í okkara marknaðarføring, fer tað í longdini at geva úrslit, sigur hon.

## Ferðavinnan spjótoddur

Súsanna Sørensen hevur sum vera man lisið frágreiðingina hjá Simon Anholt fleiri ferðir, og hon heldur, at ferðavinnan kann brúka nógv av hugskotunum í frágreiðingini.

– Frágreiðingin snúði seg um kappingarsamleikan hjá Føroyum sum heild, men Anholt nevndi, at ferðavinnan eigur at vera spjótoddurin í marknaðarføringini, tí vit hava so serstaka náttúru, mentan og søgu. Hetta leggja vit longu dent á, sigur hon.

Frískleikin í føroysku náttúruni og ímyndin um óuppdagaða landið í skandinavisku familjuni verða eisini brúkt, tá ferðavinnudeildin ger vart við Føroyar.

– Vit gera vart við frískleikan myndaliga og tekstliga, og tá vit til dømis umrøða hotellini, vísa vit á, at tey hava skandinaviskan standard. Uttanlands vita fólk, at hetta merkir, at hotellini eru ljós og løtt og ikki tung við teppum á gólvinum sum tey bretsku, vísir Súsanna Sørensen á.

## Stutt at fara allastaðni

Fólk í Føroyum hava upplivað føroysku náttúruna so ofta, at tey síggja ikki altíð, hvussu vøkur hon er. Men tað gera útlendsku ferðafólkini.

– Í veruleikanum eru vit í Føroyum sera tætt knýtt at náttúruni og okkara søguliga uppruna, men samstundis eru vit rættiliga modernað. Næstan øll eiga føroysk klæðir, og internetsamband er á hvørjum tanga. Hendan samanblandingin av gomlum og nýggjum hugtekur ferðafólk nógv, sigur Súsanna Sørensen.

Ferðafólk hava ofta á orði, sigur hon, at alt í Føroyum er so nær við. Býrt tú á Hotel Føroyum, kanst tú skoða út yvir heimsins minsta høvuðsstað, og fert tú til gongu haðani, ert tú skjótt í náttúruni. Koyrir tú so nakrar fáar minuttir í bili, kemur tú til onkra bygd, har fólk liva heilt øðrvísi enn í Havn.

Ferðavinnudeildin hjá Uttanríkisráðnum ger sær eisini dælt av, at stutt er at fara allastaðni í Føroyum at fáa